## Henning Bøgesvang 60 år



Lag: Det var en lørdag aftan…

Nu er det snart på tide, at vi skal holde fest,
For vores kære abbi som os har fåét som gæst.
For han er blevet seksti år og det er med maner,
For dersom han til stede er, man ved ej hvad der sker.

Vi havde ham derhjemme som Klaksviks predikant,
Og midt i alvorstider så var der tid til fjant.
Når han på talerstolen stod og nævnte Anders And
Da grinte vi en enkelt gang så øjet stod i vand.

Men når vi ud på plænen en vakker sommerdag,
Fik spillet fodboldkampe i alletiders brag,
Ja da var vi i hopla allesammen på engang.
Og abbi han uskyldig gik og nynned på en sang.

Vi ommu ej må glemme, så smuk som en viol,
Hun pyntet op der hjemme og skinned som en sol.
Hun mange gange rydde måtte, når vi gik til ro,
Vi ønskede at vi hos hende altid måtte bo.

Til mor, far og sviger og ommu abba kær
I ved jo at I står os så rigtig, rigtig nær
Vi ønsker kun at alle vi engang lidt nærmer bor
Og dette siger allemand – en stemme – og et kor.

Nu er i begge seksti, men unge dog i sind,
Og gæsterne de vælter til jer i aften ind.
Tillykke vi til begge to vil sige med de tres
Og takken har vi sammen sat i disse enkle vers.

Tillykke, tak til ommu for hjertets søde sang,
Og også klem og kyssen til abba Bøgesvang.
Må Herren jer velsigne som han hidtil haver gjort,
At være jeres barnebarn det føles virklig stort.

***Kristian, Ria, Paula og Villads***
***Solveig, Martin, Henning, Solborg og Anders***

## Tøkk

Hjartaliga takka vit øllum tykkum, sum á ymsan hátt
sýndu samkenslu, tá ið kæri pápabeiggi
og svágur okkara

**Nichels Adrian Poulsen**
Tórshavn

doyði og varð jarðaður.

Tøkk til tykkum, sum vóru um hann.
Tøkk til Sverra Steinholm, prest, organist,
vognførara, berarar, sangarar og gravarar.

Tøkk fyri blómur og kransar, og tøkk til tykkum,
sum fylgdu honum til hansara seinasta hvíldarstað.

*Vegna familjuna*
**Henry**

†

Tað verður hervið kunngjørt fyri ætt, vinum
og kenningum at kæra systir, fastir
og mostur okkara

**Dania Jacobina Nielsen**
Tórshavn

andaðist í heiminum í Tvørgøtu
hósdagin 2. mai, 85 ára gomul.

Jarðarferðin verður úr Havnar kirkju
sunnudagin 5. mai kl. 14.00.

*Fyri tey avvarðandi*
**Emma**

## Tøkk

Inniliga takka vit øllum fyri sýnda samkenslu,
tá ið kæri pápi, sonur, bróðir og svágur okkara

**Ingvar G. Sigurðsson**
búsitandi í Florida

andaðist og varð jarðaður.

Tøkk fyri allan stuðul.

*Familjunnar vegna*
**Elsa og Kristian Rasmussen**









# Illgruni um ILA í Árnafirði

**Nú hava menn fingið illgruna um, at ILA eisini er í alibrúkinum hjá Hellisvað í Árnafirði. Hetta váttar stjórin Magnus Danielsen fyri Sosialinum, men enn er einki staðfest**

ILA
*Stefan í Skorini*



*Illgruni er um, at ILA er í alibrúkinum í Árnafirði, men enn er einki staðfest, tí bíðað verður eftir úrslitunum av royndunum Savnsmynd*

Líkt er til at ILA fer at breiða seg um alt landið. Hetta hava djóralæknar og aðrir serfrøðingar sagt fleiri ferðir. Alarar eru sum vera man sera fjálturstungnir av hesi gongdini, men tað tykist at vera torført at byrgja upp fyri hesi herviligu sjúkuni.

Nú hevur alibrúkið í Árnafirði hjá partafelagnum Hellisvað eisini fingið illgruna um, at alt ikki ruggar rætt. Heilsufrøðiliga Starvsstovan hevur tí tikið nakrar royndir fyri at staðfesta illgrunan ella mana hann niður aftur í jørðina.

Peter Østergaard á Heilsufrøðiligu Starvsstovuni sigur, at nakrar royndir eru tiknar. Tær verða kannaðar uttanlands og í Føroyum, men enn er einki úrslit fingið av royndunum. Tað eru tríggjar ella fýra vikur síðani, at tær vórðu tiknar.

Magnus Danielsen sigur, at fellið ikki hevur verið meira enn tað vanliga. Enn er einki staðfest, og talan er bert um illgruna.

Alibrúkini hjá Faroe Salmon í Hvannasundi og við Kunoyarnes hava bæði fingið ILA, og Árnafjørður liggur ímillum hesi bæði brúkini.

Hann vil tó ikki upplýsa, hvussu nógvir ringar eru í alibrúkinum, og hann vil heldur ikki upplýsa, hvussu nógv tons ganga í teimum.

Hellisvað hevur bara alibrúk á Árnafirði, og tí fer tað at raka serliga meint, um alibrúkið verður stongt vegna ILA, tí teir hava einki annað alibrúk at dúva uppá.

# Jógvan Hugo Gardar formaður

ÁRSFUNDUR
*Stefan í Skorini*

3. mars hevði Norsk-færøsk lag ársaðalfund, og Jógvan Hugo Gardar varð afturvaldur sum formaður. Saman við honum í stýrinum sita Leif Berstad, Kristen Turtum, Bjørn Christian Borch og Annika Larsen. Hildegunn Schumann, Gunvor Garred og Gunnar Larne eru varalimir. Steinar Helland er valdur til álitismann.

Eftir aðalfundin varð Anna Kari Skarðhamar kosin heiðurslimur í felagnum fyri arbeiði sum umboð fyri føroyskan skaldskap og dans í Noreg. Anna Kari hevði eisini ein fyrilestur um Kristian Matras sum náttúruskald.

Veitslunevndin er mannað við Steinar Helland, Linda Apalnes Gardar, Kirstin Askham og Solveig Kristiansen. Bókhaldarar eru Trygve Skomedal og Karin Mortensen.

# Mentan í Útnorði

**Síðst í hesum mánaðinum verður stór mentanarstevna í Keypmannahavn, sum fer at snúgva sum um Útnorður**

MENTANARSTEVNA
*Stefan í Skorini*

Tað eru grønlendingahúsið, føroyingarhúsið og Jonshus, sum er tað íslendska mentanarhúsið, ið hava tikið stig til mentanarstevnuna í Keypmannahavn. Stevnan verður sett fríggjadagin 23. mai og endar 26. mai.

Á stevnuni verður dentur lagdur á arbeiði hjá listafólki og øðrum persónum, sum eru virknir innan mentanarlívið. Felags fyri tey øll er, at tey eru ættað úr Grønlandi, Íslandi ella Føroyum, og tey hava javnan samband við tey ymsu mentanarhúsini í Keypmannahavn.

Harumframt hava fyrireikararnir heitt á listafólk, sum búgva í móðurlandinum, um at vera við á stevnuni, so hon gerst enn meira áhugaverd.

Fyrireikararnir fara at skipa fyri fleiri tiltøkum, sum eyðkenna fólkið og tað landið, haðani tey eru ættað.

Stevnan fer fram á ymsum støðum í býnum, men miðdepilin fyri stevnuna er Húsið í Magstræde. Har verður kunningartænastan, har fólk kunnu fáa upplýsingar um stevnuna. Meira fæst at vita á heimasíðuni www.nordatlant.dk.

